# Tunnlarnir ikki alment tiknir í brúk

*Hvørjar ætlanir eru gjørdar um vegin frá bryggjuni á Syðradali og niðan í bygdina, og hvar skal vegurin verða, vil Mamy Dahl Sørensen millum annað hava at vita frá landsstýrismanninum í samferðslumálum*

ÓLAVUR Í BEITI

Mamy Dahl Sørensen, løgtingsmaður, hevur sett Finnboga Arge, samferðslumálaráðharra fyrispurning, og spyr Mamy Dahl Sørensen, nær tunnlarnir og vegirnir millum bygdirnar í Kalsoynni verða liðugtgjørdir. Nær verður farið undir at gera ferjuleguna á Syðradali? Og hvørjar ætlanir eru gjørdar um vegin frá bryggjuni/ferjuleguni á Syðradali og niðan í bygdina, og hvar skal vegurin verða?

### 12 ár síðan

Í viðmerkingunum, sigur Mamy Dahl Sørensen, at fyri tólv árum síðan gleddust kalsingar og allir norðingar um, at loksins varð vegasamband bygdanna millum í Kalsoy. Men tunnlarnir eru ongantíð alment tiknir í brúk, tí teir als ikki eru búnir til tað. Í grundini er koyribreytin at sammeta við gomlu uppdyrkingarvegirnar, sum so dánt kundu brúkast til rossavognar.

– Á hvørjum ári kemur tilfar í oynna og koyrt á vegin millum Húsar og Knúksdal, men áðrenn asfalt kemur á, er tilfarið fokið burtur til ampa fyri tey, ið skulu gera nýtslu av bønum. Seinasta summar kom asfalt í oynna, men tað liggur enn, sum tað varð lagt í dunga í Knúksdali.



*Mamy Dahl Sørensen, tingmaður, spyr nú Finnboga Arge, landsstýrismann í samferðslumálum, nær vegirnir og tunnlarnir millum bygdirnar á Kalsoynni verða gjørdir lidnir*

### Ferjulega

–Tá ferjulega er gjørd á Syðradali verða møguleikarnir at búleikast í Kalsoynni broyttir í avgerandi mun. Bæði vinnumøguleikarnir í oynni, og møguleikarnir hjá teimum, sum hava sítt arbeiði ella vinna sær handliga- ella miðnámsútbúgving aðrastaðni bøtast so avgerandi, at Kalsoyggin veruliga fær møguleikar at mennast.

– Vegur er ongantíð gjørdur frá lendingini niðan í bygdina. Tað ber nóg illa til hjá einum ungum røskum pápa ella gubba at bjarga einum barnavogni frá »Barskor« niðan til húsa. Koyristól er ikki hugsandi at fáa fram tann vegin, í hvussu ikki á hjólunum. Vegurin má gerast beinanvegin, tí tað kann ikki góðtakast, at Syðradalsfólk ikki sum onnur hava koyriveg, sum farandi er eftir. Tað er ikki meira enn rímuligt, at vegasambandið verður frá lendingini suður um og beinleiðis niðan í sjálva bygdina, sum er stytsta farleiðin.

– Tað er prógvað ferð eftir ferð, at fólk hava sýnt dirvi og hegni at fara undir og reka vinnu, tá tað ber til. Men skal dirvið og hegnið ikki verða køvt í føðingini, so má eitt minstamark av sambandi verða til staðar. Hesin partur av útoyggjapolitikkinum kann loysast fyri Kalsoynna, um omanfyrinevndu spurningar kunnu svarast positivt, og positivu svarini verða til veruleika og ikki sum so ofta til orð og orð og aftur orð, men einki hendir í verki, sigur Mamy Dahl Sørensen í viðmerkingunum og samtykt er at landsstýrismaðurin skal svarað fyrispurninginum.



# Gongur undan við súrevni

*Manningin umborð á Kursk hevur nóg mikið av súrevni til at yvirliva til í morgin*

EYÐUN KLAKSTEIN

Tvær tær fyrstu royndirnar at bjarga manningini, sum er strandað umborð á russiska kavbátinum Kursk, sum er sokkin í Barentshavinum, miseydnaðust.

Í gjár fóru russar undir triðju royndina, og hesaferð søgdu myndugleikarnir seg vera meira bjartskygdar fyri, at bjargingin skuldi eydnast.

Ovastin í sjóverjuni, Vladimir Kurojedov segði í gjár fyri fjølmiðlunum, at teir 116 menninir umborð á Kursk hava nóg mikið av súrevni til at klára seg til fríggjadagin.

### Eingin leki

Manningin á Kursk hevur kunnað givið boð frá sær við at banka á skrokkin á kavbátinum, men russiska sjóverjan sigur nú, at nú er lítið at hoyra frá manningini. Helst er hetta tí, at teir vilja spara súrevni, og tí ikki vilja gera ov nógv av.

155 metra langi Kursk liggur á 108 metra dýpi í Barentshavinum , og nú roynir russiska sjóverjan at fáa eitt bjargingarhylki niður til Kursk.

Norska tíðindastovan, NTB, sigur, at einki óvanligt geislavirkni kann málast í Barentshavinum. Kursk er kjarnorkudrivin, men russiska sjóverjan tvíheldur um, at reaktorurin umborð varð sløktur eftir forskriftunum, og at eingin vandi er fyri leka.

– Havið tolir nógv av. Um geislavirkin evni leka út í havið, so skal nógv til, áðrenn nakar vandi stendst av hesum, sigur Ole Harbitz, sum starvast fyri norsku Kreppunevndina fyri Kjarnorkuóhapp

# Fleiri kvinnur í politikk

*Lisbeth L. Petersen, løgtingsmaður, vil hava løgmann at seta eina nevnd við umboðum úr politisku flokkunum, Javnstøðunevndini og kvinnufeløgunum*

ÓLAVUR Í BEITI

Lisbeth L. Petersen, løgtingsmaður, hevur spurt løgmann, um hann fer at taka stig til at seta eina nevnd við umboðum úr teimum politisku flokkunum, javnstøðunevndini og kvinnufeløgum við tí arbeiðssetningi at leggja til rættis tvørpolitisk tiltøk fyri at økja lut kvinnunar í tí politisku støðutakanini ?

Í viðmerkingunum vísur Lisbeth L. Petersen til, at á ársfundi Ùtnorðurráðsins í Íslandi í august 1999 var soljóðandi rekommandatión nr. 1 samtykt: Vestnordisk Råd godkender den fremlagte rekommandation om at, Rådet henstiller til Færøernes Landsstyre og Grønlands Landsstyre at nedsætte et udvalg i deres respektive lande med repræsentanter fra alle politiske partier, ligestillingsudvalget/rådet og fra centrale kvindesagsorganisationer for at planlægge tværpolitiske tiltag til at øge kvinders andel i den politiske beslutningsproces.

### 12%kvinnur

Grundarlagið undir samtyktini varð lagt á ráðstevnuni »Kvinnupolitiskur Verkstaður«, ið var hildin í Føroyum á sumri 1999. Á ráðstevnuni luttóku fakfólk úr Føroyum, Grønlandi og Íslandi. Ráðstevnan var hildin eftir tilmæli frá politikarum í Útnorðurráðnum.

Víst verður í viðmerkingunum til fyrispurningin til hesar viðmerkingar til uppskotið: På Færøerne er kvinders andel i Lagtinget kun 12% og i Grønland er kvinders andel i Landstinget kun 14%. I Island var kvindernes andel i Altinget kun 25% i perioden 1995-1999. Ved Altingsvalget i maj 1999 blev der valgt 35% kvinder ind på Altinget. Dette kan i høj grad tilskrives, at der blev nedsat et udvalg i Island med det formål at planlægge tværpolitiske foranstaltninger for at øge kvinders andel i politik. Råd mener, at det, for at øge kvinders andel i den politiske beslutningsproces i Grønland og på Færøerne, er vigtigt, at der nedsættes udvalg i landene for at planlægge tværpolitiske tiltag i ovennævnt sammenhæng, ligesom man gjorde i Island.



*Lisbeth L. Petersen*

Løgtingið samtykti á tingfundi 18. november 1999 við akvøðutalinum 27-0-1 at taka undir við nevndu tilráðing frá Útnorðurráðnum, verður sagt í viðmerkingunum.

# Viðgera vinnuliga fiskiskapin

Tingfundur verður í dag klokkan 10.00. Á skránni eru tvey mál, umframt framløga.

Fyrst skal tingið taka støðu til, um Anfinn Kallsberg, løgmaður, skal svara einum fyrispurngini frá Lisbeth L. Petersen um setan av nevnd at leggja til rættis tiltøk fyri at økja lutin hjá kvinnum í politisku støðutakanini.

Síðani fer tingið at hava triðju viðgerð av av uppskotinum til løgtingslóg um broyting í løgtingslógini um vinnuligan fiskiskap.

Eftir tað er framløga á skránni. *ek*



# Bjartskygdir undan dystinum

*Undan dystinum millum Føroyar og Danmark spurdu vit til stuttleika núverandi løgmann, varaløgmann og nakrar fyrrverandi løgmenn, hvat teir vænta sær av dystinum*

HEINI Í SKORINI

Áhugin var sum vera man stórur undan dystinum mikukvøldið á Tórsvølli millum Føroyar og Danmark. Reint ítróttarliga er áhugin stórur, men orsøkin er eisini hon, at tað er eitt ávíst politiskt undirspæl í hesum dysti. Vit spurdu tí til stuttleika nakrar av okkara fyrrverandi løgmonnum, núverandi løgmann og varaløgmann, hvat teir væntaðu sær av dystinum, um teir vóru til staðar á Tórsvølli, og um teir løgdu nakað politiskt í dystin.

**Jógvan Sundstein:** Eg vænti, at endaliga støðan gerst 2-1 til Føroyar. Eg haldi, at møguleikin er altíð til staðar fyri einum sigri, og eg ætli mær eisini at hyggja at dystinum á Tórsvølli.

Todi Jónsson segði herfyri í eini samrøðu við við danska blaðið BT, at tað hevði verið hansara størsta fótbóltsupplivilsi, um hann vann á dønum, og tað eri eg samdur við honum í.

Eg leggi ikki nakað serligt politiskt í dystin, men tað hevði verið ómetaliga stuttligt, um føroyingar megnaðu at vinna.

**Atli Dam:** Eg tippi 3-1 til Danmark, og eg ætli mær sjálvur at hyggja at dystinum.

Eg haldi ikki, at eg leggi meiri í henda dystin enn nakran annan dyst, sæð frá politisku síðuni, men við at spæla móti liðum, sum á pappírinum eru sterkari enn vit, er hetta ein frálíkur møguleiki hjá føroyska landsliðnum at fáa góða venjing.

**Pauli Ellefsen:** Eg haldi, at danir síggja ótrúliga bangnir út, so um teir ikki royna at lumpa okkum, kundi tað í hvussu so er enda 1-1.

Eg havi ongantíð tíð at fara at hyggja at fótbólti, so eg verið ikki til staðar á Tórsvølli í kvøld.

Burtursæð frá tí, at eg slettis ikki eri áhugaður fyri fótbólti, so vildi eg ynskt, at vit á hesum øki bankaðu danir sundur og saman.

**Anfinn Kallsberg:** Eg vænti, at dysturin endar 3-1 til Danmark. Tíverri eri eg ikki í Havn mikukvøldið, so eg fari ikki at hyggja at dystinum.

Eg haldi ikki, at ein eigur at blanda politikk og fótbólt, og ítrótt sum heild, saman. So eg leggi ikki nakað politiskt í henda dystin, hóast tað eru Føroyar og Danmark sum spæla.

**Høgni Hoydal:** Eg tippi 2-1 til Føroyar, tað er avgjørt mítt ynski fyri dystin í kvøld.

Eg fari heilt víst til dystin, og satt at siga havi eg sjáldan verið so spentur í mínum lívi. Eg var niðri í Parkini í Keypmannahavn í 1990, tá Føroyar og Danmark spældu, og tað var eitt satt upplivilsi, so eg gleði meg avgjørt at hyggja í kvøld.

Ein skal ongantíð politisera ítrótt, men tað er klárt at bæði okkara avrik og okkara úrslit, hava ótrúliga stóran týdning fyri sjálvsálitið hjá føroyingum. Tað hevur eisini stóran mentunarligan týdning fyri tjóðina, men eg vil ikki taka einkarætt uppá okkara fótbóltslandslið sum allir føroyingar eiga, uttan mun til um tey stuðla fullveldi ella ikki.



*Jógvan Sundstein: 2-1 til Føroyar*



*Atli Dam: 3-1 til Danmark*



*Pauli Ellefsen: javnleikur 1-1*



*Anfinn Kallsberg: 3-1 til Danmark*



*Høgni Hoydal: 2-1 til Føroyar*

# Neytalortur gevur pengar til B71

Nú fríggjadagin fáa sandoyingar og onnur áhugaði høvi at uppliva eitt heldur øðrvísi tiltak. Fótbóltsfelagið B71 skipar fyri einum tiltaki, ið teir kallað **neytalortakapping.**

Økta virksemi í frítíðarfeløgunum kring landið krevur, at fleir pengar skulu í kassan. Hetta krevur so aftur økta arbeiðsorku hjá teimum, ið standa frammi. Tíðum má høvdið leggjast í blot fyri at røkka ásettum pengaupphæddum á fíggjarætlanum.

B71 er eitt av teimum minnu fótbóltsfeløgunum her á landi, men hevur í mong ár talst millum tey fremstu. Fyri at verða við millum tey fremstu krevst nógv av felagnum ikki minst peningaliga. Í vikuskiftinum skipar áhugafelagið hjá B71 fyri einum B71 vikuskiftið við nógvum ymiskum á skránni allar vikuskiftisdagarnar. Fríggjadagin kl. 17.00 skal neytalortur fyri fyrstu ferð skal tryggja B71 pengar í kassan. Ein tarvur verður sleptur inn á eitt 400 fermetrar stórt øki niðri á Sand. Økið er býtt í 400 puntar, (hvør puntur 1 fermetur) ið eru seldir sum lutaseðlar. Ein lutaseðil kostar 100 kr. Nú í vikuni hava og fara fólk at selja hesar 400 lutaseðlarnar. Vinningurin er tarvurin. Og vinnarin er hann, ið taruvrin vísir miskunsemi við at skíta í tann punt, viðkomandi hevur ognað sær fyri ein 100 krónuseðil. Við øðrum orðum - fyrsti lorturin frá tarvinum útloysir vinningin.

So er bert eftir at vóna fyri fyrireikararnar, at tarvurin ikki fær ein ferðil av rennikatrinu og skítur all over the place_. Tá má helst ein ”lortadómari” koma upp í leikin. Livst so spyrst!!

# Dansinátt í Øravík

ÁKI BERTHOLDSEN

Leygarkvøldið 19. august verður stór dansinátt í Øravík.

Tað eru tey fýra dansifeløgini í Suðuroynni, ið skipa fyri tiltakinum, sum verður á hotellinum í Øravík. Men tey leggja dent á, at tiltakið er alment, so at ein og hvør, sum hevur hug til føroyskan dans, er vælkomin við.

Tey, sum eru limir í onkrum av teimum fýra dansifeløgunum melda seg til hjá teimum.

Tey, sum ikki eru limir í nøkrum dansifelag, kunnu melda seg til beinleiðis hjá hotellinum í Øravík. Seinasta freist at melda til er fríggjadagin á miðdegi.

Dansináttin byrjar við døgverða á hotellinum kl. 20.00, har fólk kunnu velja ímillum tríggjar høvuðsrættir, lambasteik, oksasteik ella fleskasteik. Tað, sum tey vilja hava útyvir tað, betala fólk sjálvi.

Annars kostar atgongumerkið 100 krónur og tað er galdandi fyri bæði døgverða og dans. Tey, sum barra bara fara í dans, betala 50 krónur. Sjálvur dansurin byrjar kl. 22.30.

Tey fýra dansifeløgini í Suðuroy eru Sumbiar Dansifelag, Jómsvíkingar í Vági, Tvøroyrar Dansifelag og Suðuroyar Norðara Dansifelag. Tað er tó eingin treyt, at fólk eru limir í nøkrum av dansifeløgunum fyri at vera í dansinum.


# B71 Ítróttardagar

**Áhugafelagið og B71 skipa fyri ítróttardøgum heima á Sandi vikuskiftið 18.08 - 20.08.00 við hesi skrá:**

**Fríggjadagin 18.08.00**

kl. 17.00 **Neytalortakapping** niðri á Sand
kl. 21.00 **Barnadiskotek**

**Leygardagin 19.08.00**

kl. 09.30 ***Fótbóltur:* FM-bólkur - a. piltar**
kl. 11.30 ***Fótbóltur:* Gentur12-14**
kl. 13.30 ***Fótbóltur:* Gentur10-12**
kl. 15.00 **Skrúðgonga** úr skúlanum út til virkið
**Emil Nólsøe setir stevnuna**
kl. 16.00 **Hoppiborg - Hamarslag - Seymsláing - Skjóting - Matsøla - Køkutombula**
(í Virkinum og uttanfyri)
kl. 17.00 **Rulluskoytukapping**
Byrja verður úti í Støð og norður til Virkið.
Aldursbólkarnir eru 6-8 ár, 8-10 ár, 10-12 ár, 12 ár og eldri (hjálmur er kravdur)
kl. 18.00 **100 m. kapprenning**
Byrja verður við Virkið. Aldursbólkarnir eru: 6-8 ár, 8-10 ár, 10-12 ár, 12-16 ár, 16ár og eldri
kl. 23.00 **Høgni Hoydal flytir fram røðu**
kl. 24.00 **Cocktail spælir til dans**

**Sunnudagin 20.08.00**

kl. 13.00 ***Fótbóltur* B71- AB** 2. deild kvinnur
kl. 15.00 ***Fótbóltur* B71- B68** 1. deild
kl. 17.00 ***Fótbóltur* B71- B68** 3. deild
kl. 19.00 **Rimmar BINGO** í Virkinum

***Øll eru hjartaliga vælkomin!***

**ÁHUGAFELAGIÐ B71**

Sosialurin - 311820